


# Gastroskopi-kanning

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ

SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS
Innihaldið í hesum faldaranum er dagført 13/01/2023

## HVAT ER GASTROSKOPI

Gatroskopi er ein kanning, ið verður gjørd av maganum.

Eitt gastroskop er ein tunn liðilig slanga á tjúkd við lítlafingur, ið verður førd gjøgnum munnin niður í magan. Gastroskopið er útgjørt við einum "kikara" í endanum, so læknin sær broytingar í vælindi, maga og buggørnum/tólvfingurtarmi. Um neyðugt, kann kyknuroynd takast gjøgnum gastroskopið.

## Fyrireiking til kanningina

Dagin fyri kanningina kanst tú eta vanligan mat.

<u>Aftaná kl. 24.00 skalt tú fasta, tvs. at tú skalt ikki eta, drekka ella roykja.</u>

## HEILIVÁGUR

Nýtir tú heilivágspístr fyri astmu, skalt tú hava tað við tær á sjúkrahúsið.

Nýtir tú insulin, skalt tú seta teg í samband við okkum dagin fyri kanningina á tlf. 34 33 00 lok. 3210.

## KANNINGIN

Tú skalt møta í bíðirúminum við leiðbeiningina/telefonvekslaran og siga starvsfólkinum har, at tú ert komin.

Tú fært eina song at liggja í, og ein sjúkrarøktarfrøðingur leggur kanylu í eina æðr á handarbakinum.

Tú fært doyvandi heilivág í æðrina, meðan kanningin er.

Tú merkir onga pínu, men av tí at luft verður blást gjøgnum gastroskopið niður í magan, kanst tú merkja trýst um flagbróstið, fara at ropa og spýta.

Kanningin tekur uml. 5-10 min.

## AFTANÁ KANNINGINA

Aftaná kanningina verður tú liggjandi í songini, til tú ert komin fyri teg.
Áðrenn tú fert heim, fært tú at eta og drekka.
Ert tú innlagdur/innløgd, fert tú aftur á seingjadeildina eftir kanningina.

## BILKOYRING

Av tí at tú hevur fingið doyvandi heilivág, skalt tú ikki koyra bil fyrr enn 12 tímar eftir kanningina.

## KANNINGARÚRSLIT

Áðrenn tú verður útskrivað/-ur, greiðir læknin tær frá úrslitinum av kanningini.

Er kyknuroynd tikin av rovuni, er svarið klárt eina til tvær vikur eftir kanningina.

Avtalað verður, hvussu tú fært svarið.



*Eru ivamál, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á tlf. 34 33 00.*

*Vinarliga*

*Suðuroyar Sjúkrahús*

**Um tú ikki kanst møta ásettu tíð, verður tú vinarliga biðin at ringja tlf. 34 33 00 lokal 3227.**